gott og minni gott frá framførslunum. Ineptus havi eg longu nevnt. Næstu bólkarnir, fram til midnátt, tá teir íslendsku Mezzoforte spældu, komu í hesi røð: Beatboy, Crawling Blue, Gunnar & Maria Guttesen, Kristleif Zachariassen, Høgni Lisberg, Lena Anderssen, Eyðun Nolsøe Band og Marius (solo). Hetta eru sera ymiskir bólkar og artistar, sum spæla ymsi sløg av popp-, rapp-, rokk- og bluestónleiki.

## Eyðun Nolsøe í stórformi

Sum heild fari eg at halda, at ongin av hesum nøvnum skaraði fram um nakað annað, og tey, sum eg frammanundan hevði størstu vónirnar til, so sum Lena Anderssen, Maria Guttesen og Eyðun Nolsøe Band, gjørdu tað, sum væntast kundi av teimum: spældu og sungu gott og høvdu góðar framførslur. Eyðun Nolsøe Band var mannað við nøkrum av bestu tónleikarum okkara, so sum Leivi Thomsen á gittar, Hans Petur í Brekkunum saxofon, Rógva á Rógvi á trummum og Arnold Ludvig á bass, og tað hoyrdist. Skal nakar takast framum nakran henda fyrsta partin av konsertini, má tað vera teir, tí teir høvdu veruliga tak á lurtarafjøldini, ikki minst Eyðun Nolsøe sjálvur, sum var í stórformi, og sum til dagsins høvi avdúkaði, at hann gevur út nýggja fløgu í heyst. Góð tíðindi fyri gamlar Frændur og Eyðun Nolsøe fjepparar.

## Úrmælingarnir úr útnorðri: Mezzoforte

Stóra tónlistarliga upplivilsið og høvuðsnavn á ólavsøkukonsertini hesaferð var íslendski bólkurin Mezzoforte. Við sínum framúr dugnaligu tónleikarum og eini spæligleði, sum skein langa leið av pallinum, bergtóku teir í útivið hálvan annan tíma ikki so fáar av teimum tá umleið 900 áhoyrarunum – altso ein heil Mezzoforte konsert í ólavsøkukonsertini. Tað var feitt og allar pengarnar vert, bara tað. Tey, sum ikki kendu Mezzoforte áðrenn mundu kortini kenna aftur løg frá ítróttasendingum í útvarpinum, har tey


Kokkporn úr ólavsøkukabarettini var eitt av festligu innsløgunum í MC-Hár framførsluni


Danski Beatboy kom á pallin við sínum ljóðshowi


The Dreams við nýggjum útgávum av kendum lættisoppaløgum


Eyðun Nolsøe Band var mannað við nøkrum av bestu tónleikarum okkara


Side Effect tóku áhoyrararnir á bóli



Mezzoforte spældi í útivið hálvan annan tíma – altso ein heil Mezzoforte konsert í ólavsøkukonsertini


Hans Petur í Brekkunum spældi við Brekku Brothers og Eyðun Nolsøe Band